**Nr. 51/2018**

**Kári P. Højgaard**
**løgtingsmaður**

**Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur um teldutøka savnið hjá Beta files, settur løgmanni, Akseli V. Johannesen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)**

1. Eru tvær milliónir kr. tøkar í ár til gransking av Beta Files tilfarinum?

2. Hvørji stig eru tikin til tess at kunna um, fáa sett gongd á og harvið fremja Løgtingsins vilja at byrja fiskivinnugransking í teldutøka tilfarinum hjá Beta files. Eru samráðingar tiknar upp við nevndina og Runavíkar Kommunu?

3. Kann løgmaður upplýsa, um nakrar granskingarumsóknir eru komnar og nær granskingararbeiðið byrjar?

**Viðmerkingar:**
Á løgtingsfíggjarlógini fyri 2018 var ein millión sett av á konto 7.23.6.25 undir yvirskriftini Fiskivinnusavnið Beta (Stuðulsjáttan). Ein millión er eisini játtað í 2019, og árlig játtan er við í langtíðarætlanini.

Endamálið við játtanini er at stuðla gransking í tilfari frá partafelagnum Beta um felagsins virksemi, sum er savnað og skrásett frá 1977 til 2006.

Neyvan nakrantíð hevur slíkur granskingarmøguleiki staðið føroyingum í boði, har øll skjøl eru tøk viðvíkjandi rakstrinum hjá einum felag, ið fevndi um 8 partrolarar í 3 áratíggju. Alt tilfarið er talgilt/digitaliserað. Her er kunning um m.a. øll troløki, tóv, troltímar og veiðu í hálinum v.m.

Henda vitan og tað arbeiðið, ið higartil er lagt úr hondum, kann neyvan metast í virði. At talan er um sera viðkomandi granskingartilfar, hava navnframir menn her á landi og uttan úr heimi váttað.

Eysturoyggin er sum kunnugt lokomotivið í føroyskari fiskivinnu, so tað skuldi verið sjálvsagt, at fiskivinnugransking hevur góðar karmar í nærumhvørvinum.

Nú 13 1/2 mánað eftir, at peningurin varð tøkur, er granskingin ikki byrjað. Tí verður spurningurin settur løgmanni, sum í løtuni umsitir mentamál.

**Á Løgtingi, 14. februar 2019**

**Kári P. Højgaard**